# Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

**Spyrjari:** Annika Olsen, løgtingsmaður

**Svarari:** Margit Stórá, landsstýrismaður í heilsumálum

**Evni:** Tannrøkt til eldri borgarar og til fólk, sum eru avlamin

**Spurningar:**

1. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at tryggja, at eldri og avlamin, ið ikki megna at fara til tannlækna/tannrøktara fáa ein lógartryggjaðan rætt til hetta?
2. Hvussu nógvir borgarar fáa ikki tannrøkt í Føroyum orsakað av heilsustøðu?
3. Hvussu nógvir borgarar, ið eru avlamin og óhjálpin, fáa ikki tannrøkt í Føroyum?
4. Um hagtøl ikki finnast á hesum øki, vil landsstýrismaðurin so arbeiða fyri at kanna hesi viðurskifti?

**Viðmerkingar:**
Tanntøkt og møguleikin at fáa tannlæknaviðgerð er ein grundleggjandi rættur, sum vit ynskja at veita øllum borgarum í okkara samfelag. Vit hava ókeypis barnatannrøkt, sum umfatar børn upp til 18 ár, tí vit ynskja, at børn okkara hava góðar tenn, og at tannheilsan hjá okkara børnum er góð. Ert tú eldri enn 18 ár, hevur tú sum borgari møguleika at leita tær til tannlækna við jøvnum millumbili, tá tørvur er á tí, afturfyri eitt gjald. Verri er støðan hjá okkara eldri borgarum og fólkum, sum eru óhjálpin og avlamin. Í 2019 játtaði Tórshavnar býráð 200 tús. kr. til eina mobila tannlæknaeind til ellis- og røktarheimini, soleiðis at okkara gomlu kundu fáa tannrøkt og møguleika at fáa tannlæknaviðgerð. Avbjóðingin vísir seg nú at vera, at tað reisa seg nógvar lógartekniskar avbjóðingar um t.d., hvør skal taka sær av hesum á ellis- og røktarheimunum, og hvussu tannrøkt kann veitast til borgarar undir eitt nú heimatænastuni. Harafturat sita nógvir borgarar heima við hús, avlamin og óhjálpin og hava ikki eins góðar møguleikar at fáa tannrøkt, sum aðrir borgarar. Kanningar vísa, at góð tannrøkt er avgerandi fyri ein sunnan aldurdóm og fyri góða lívsgóðsku. Eldri fólk taka nógvan heilivág, sum eisini ávirkar teirra tenn, og sum fer illa við tonnunum við árunum. At hava góðar tenn er eisini umráðandi fyri føðsluna hjá eldri. I grannalondunum hjá okkum eru hesi viðurskiftini lógartryggjað, og tí verða hesir spurningar settir landsstýrismanninum í heilsumálum.

**Á Løgtingi, 11. mai 2023**

Annika Olsen